GJALDSTOVAN

Tórshavn 2. oktober 2014

Tíðindaskriv

Føroyar varðveita somu rating

Ratingfyritøkan Moody's hevur aftur í ár givið Føroyum ratingina Aa3, við negativum útlitum. Aa3 er fjórðhægsta rating av 21 møguligum.

Styrkin í føroyska búskapinum sigur Moody's vera

- búskaparligt sjálvstýri,
- støðug viðurskifti við Danmark og
- stórt gjaldføri, sum minkar um endurfíggingarváðan

Hinvegin eru avbjóðingarnar at

- skuldin er økt seinastu árini,
- búskapurin er so tengdur at fiskivinnuni og at
- fíggjarlógin framvegis hevur hall

Orsøkin, at Moody's framhaldandi hevur negativt útlit, er, at fíggjarlógin framhaldandi hevur hall og hevur havt tað síðani 2008 og at skuldarbyrðan veksur.

Um Føroyar megna at fáa bygnaðarliga hallið á fíggjarlógini at javnviga og at minka skuldina, kann tað ávirka ratingina positiva vegin. Um landsstýrið ikki megnar at halda ætlanina at lækka hallið á fíggjarlógini, og harvið økja skuldina meira enn ætlað, so kann hetta ávirka ratingina negativa vegin.

Frágreiðingin hjá Mooyd's er løgd hjá.

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | FO-165 ARGIR | FØROYAR | TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO